


Tel 34 10 10 · Fax 34 10 01

ATLANTIC AIRWAYS

atlantic.fo


# Freistin at atkvøða er úti á miðnátt

**Seinastu vikurnar hava lesarar av Planet.fo á tlf. 1930 givið sína meining, um hvør skal vinna hvørja planet. Freistin at verða við í avgerðini og í kappingini um góðu vinningarnar er úti á miðnátt í kvøld, mikukvøldið**

PLANET AWARDS

**Niels Uni Dam**
nielsuni@sosialurin.fo

Síðan 5. januar hava lesarar á Planet. fo atkvøtt millum tey tilnevndu til ársins planet heiðurslønir, ið verða avdúkaðar leygarkvøldið. Enn ber til at atkvøða, men á miðnátt mikukvøldið er freistin úti.

Ein serlig dómsnevnd hevur nú latið sínar atkvøður inn. Limirnir í dómsnevndini hava hvør í sínum lagi atkvøtt millum tey fimm nøvnini, ið eru tilnevnd til hvørja planet, og teirra samlaðu atkvøður telja helmingin av endaliga úrslitinum.

Innkomnu SMS atkvøðurnar telja hin helmingin. Tá freistin at atkvøða er av, verða atkvøðurnar hjá fólki og dómsnevndini taldar saman til eitt endaligt úrslit, sum verður almannakunngjørt á Planet Awards á Hotel Føroyum.

Fyri at atkvøða send eini sms boð til 1930, við koduni, ið stendur aftan fyri tað navnið, ið tú vilt atkvøða fyri. Hvørt sms kostar 5 kr, og tú hevur loyvi at atkvøða einaferð fyri hvørja planet. Øll føroysk fartelefonhald bæði hjá Føroya Tele og hjá Kalli kunnu luttaka.

Tey, ið eru við í atkvøðugreiðsluni taka samstundis lut í lutakastinum um góðu vinningarnar.




VINNINGAR
Samsung X830 fartelefon
Ipod Nano 4 Gb
Iomega eksternur harddiskur 250 Gb

FØROYA TELE · KONTOIN · Føroya Bjór · Sosialurin · TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR · Hotel Føroyar · ATLANTIC AIRWAYS